# Fíggjarmálaráðið

| | |
|---|---|
| Dagfesting: | 08.11.2023 |
| Mál nr.: | 23/16310 |
| Málsviðgjørt: | JEK |
| Ummælistíð: | Frá 08.11. til 22.11.2023 |
| Eftirkannað: | Lógartænastan dagfestir |

**Uppskot til**

**Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um meirvirðisgjald (Meirvirðisgjaldslógin)**
(Grønar hitaloysnir, talgildir fjølmiðlar og talgild avgjaldsuppgerð)

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. 136 frá 8. september 1992 um meirvirðisgjald (Meirvirðisgjaldslógin), sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 61 frá 22. mai 2023, verða gjørdar hesar broytingar:

**1.** Í § 3 d, stk. 1 verða 2., 3. og 4 pkt. orðað soleiðis:
“Í 2024 verður alt meirvirðisgjaldið endurgoldið. Í 2025 verða 75% av meirvirðisgjaldinum endurgoldin, í 2026 verða 50% av meirvirðisgjaldinum endurgoldin, og í 2027 verða 25% av meirvirðisgjaldinum endurgoldin. Í 2028 og fylgjandi ár verður meirvirðisgjaldið ikki endurgoldið.”

**2.** § 12, stk. 1, litra h) verður orðað soleiðis:
“h) Søla av tíðindabløðum, undir hesum talgildum avísum, og prenting fyri tíðindabløð.”

**3.** § 20, stk. 1, 1. pkt. og 2. pkt. verða orðað soleiðis:
“Skrásett virkir skulu seinast 1 mánað og 10 dagar aftaná endan av 1. 3. og 4. avgjaldstíðarskeiði boða TAKS talgilt frá støddini á útgangandi og inngangandi avgjaldinum í tíðarskeiðnum og støddina av søluni, sbrt. § 12, stk. 1-4, ið ikki skal roknast við í avgjaldsskyldugu søluna. Freistin fyri 2. avgjaldstíðarskeið er 24. august.”

**§ 2**

*Stk. 1.* Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.
*Stk. 2.* § 1, stk. 1 hevur virknað frá 1. januar 2024.

*Stk. 3.* § 1, nr. 2 og 3 hava virknað frá 1. ársfjórðingi 2024.

## Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

### 1.1. Orsakir til uppskotið

Við uppskotinum verða tríggjar broytingar gjørdar í meirvirðisgjaldslógini:

- Stigvísa minkingin í afturberingini av meirvirðisgjaldi fyri grønar hitaskipanir verður broytt, tí at mett verður, at tað er ov ógvisligt at minka stigvísu afturberingina eftir verandi leisti.
- Sambært galdandi lóggávu er søla av tíðindabløðum meirvirðisgjaldsfrí. Við uppskotinum verða tíðindabløð og talgildir tíðindamiðlar javnsettir.
- Fyri at gera umsitingina av avgjaldsuppgerðini einfaldari og meira tíðarhóskandi verður ásett, at skrásett virkir skulu talgilt boða TAKS frá støddini á útgangandi og inngangandi avgjaldinum í tíðarskeiðnum og støddina av søluni, sbrt. § 12, stk. 1-4, ið ikki skal roknast við í avgjaldsskyldugu søluna.

*Hitapumpur*

MVG frítøkan fyri hitapumpur hevur verið galdandi síðani 2017. Løgtingið samtykti hin 5. mai 2022, at Føroyar skuldu minka útlátið av vakstrarhúsgassi við í minsta lagi 30% næstu 10 árini. Málið skuldi røkkast við 25 átøkum. Afturbering av meirvirðisgjaldi var eitt av átøkunum í orku- og veðurlagspolitikkinum.

Veitarar hava greitt frá, at veitingartíðin í løtuni er upp í 10 mánaðir. Tað verður tí mett at vera skilagott, at verandi skipan, har alt meirvirðisgjald verður afturborið, verður longd til eisini at fevna um 2024. Síðani verður skipanin avtikin yvir 4 ár.

Talan er sostatt um eina meira lagaliga avtøka av skipanini, enn tað, sum galdandi løgtingslóg ásetir.

Afturberingin av meirvirðisgjaldi varð innførd í 2017. Skipanin er síðani longd eina ferð. Endamálið við afturberingini er skunda undir grøna orkuskiftið. Í 2018 vóru 86 umsóknir um MVG afturbering. Í 2022 vóru 346 umsóknir, og higartil í ár eru innkomnar 607 umsóknir.

*Talgildir tíðindamiðlar*

Sambært § 12, stk. 1, litra h í meirvirðisgjaldslógini er søla av tíðindindabløðum meirvirðisgjaldfrí. Søla av talgildum avísum er hinvegin ikki meirvirðisgjaldsfrí, og verður kappingin millum analogu og talgildu tíðindamiðlarnar tí ójøvn.

Verandi skipan er harnæst ein avbjóðing fyri TAKS, serliga tá talan er um miðlar, sum lutvíst eru talgildir, lutvíst analogir, tí til ber at tekna hald, sum antin fevnir um annað ella bæði.

Í Danmark hava talgildir tíðindamiðlar verið javnsettir við analogar tíðindamiðlar seinastu gott og væl fýra árini. Broytingin í donsku momslógini varð gjørd eftir at ES Ráðið við direktivi nr. 2018/1713/EU frá 6. november 2018 broytti direktiv 2006/112/EF, sum higartil ikki hevði loyvt, at talgildir tíðindamiðlar vórðu viðgjørdir eins og analogir tíðindamiðlar í meirvirðisgjaldshøpi.

Føroyska meirvirðisgjaldslógin byggir á áðurnevnda ES-momsdirektiv.

*Talgild innlating av MVG-uppgerðum*
TAKS hevur seinastu árini gjørt nógv við at effektivisera mannagongdir og menna sjálvgreiðslur, og flest allar fyritøkur brúka hesar sjálvgreiðslur. Allar arbeiðsgongdir eru fyrst og fremst grundaðar á, at sjálvsgreiðslurnar verða brúktar. Tó eru tað framvegis nakrar fáar fyritøkur, sum ikki brúka hesar sjálvgreiðslur, og tí er neyðugt at hava serligar og tíðarkrevjandi arbeiðsgongdir til hesu fáu fyritøkurnar. Umframt at hetta skapar nógv, óneyðugt arbeiði, økir hetta eisini um møguleikan fyri, at feilir henda.

TAKS ynskir tí, at tað framyvir verður eitt krav, at MVG-uppgerðir verða innlatnar talgilt, t.v.s. umvegis sjálvgreiðsluna Vinnugluggin, hjá TAKS.

Av teimum 4.805 MVG-uppgerðunum, sum áttu at verða innlatnar 2. ársfjórðing 2023, blivu 4.221 innlatnar talgilt, 323 onkursvegna manuelt, meðan. 261 framvegis mangla at koma inn. Hetta svarar til at 88% blivu innlatnar talgilt, og at 7% blivu innlatnar á annan hátt.

**1.2. Galdandi lóggáva**
Sambært galdandi lóggávu verður helvtin av meirvirðisgjaldinum endurgoldin í 2024 og 2025. Í 2026 og fylgjandi ár verður meirvirðisgjaldið ikki endurgoldið.

Tíðindabløð eru sambært galdandi lóggávu ikki avgjaldsskyldug.

Galdandi lóggáva hevur ikki ásetingar sum siga, hvussu skrásett virkir skulu boða TAKS frá støddini á útgangandi og inngangandi avgjaldinum í tíðarskeiðnum og støddina av søluni, sbrt. § 12, stk. 1-4, ið ikki skal roknast við í avgjaldsskyldugu søluna.

**1.3. Endamálið við uppskotinum**
Endamálið við uppskotinum er at gera stigvísu lækkingina av meirvirðisgjaldi við keyp av grønum hitaskipanum meira lagaliga.

Endamálið við uppskotinum er harnæst at javnseta tíðindabløð og talgildar tíðindamiðlar í meirvirðisgjaldshøpi.

Loksins er endamálð við uppskotinum at gera umsitingina av avgjaldsuppgerðini einfaldari og meira tíðarhóskandi við at nágreina, at skrásett virkir talgilt skulu boða TAKS frá støddini á útgangandi og inngangandi avgjaldinum í tíðarskeiðnum og støddina av søluni, sbrt. § 12, stk. 1-4, ið ikki skal roknast við í avgjaldsskyldugu søluna.

**1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum**
Við uppskotinum verður stigvísa lækkingin í afturberingini við keyp av grønum hitaloysnum gjørd meira lagalig, tíðindabløð og talgildir tíðindamiðlar verða javnsettir í meirvirðisgjaldshøpi og umsitingin av avgjaldsuppgerðini verður gjørd einfaldari og meira tíðarhóskandi.

**1.5. Ummæli og ummælisskjal**
Uppskotið hevur verið til hoyringar hjá

- TAKS

- Umhvørvisstovuni
- SEV
- Handilsvinnufelagnum
- Stjórnaráðunum
- Vinnuhúsinum
- Sosialinum
- Portalinum
- Vága Portalinum
- Norðlýsinum
- Frihedsbrevet
- Føroya Náttúru- og Umhvørvisfelag (FNU)
- P/F Leif Mohr
- MAGN
- EFFO
- Demich
- Hiti
- KROSSTEIN
- Klima
- Sp/f. C. Christiansen
- KES
- Climashop
- Maria Poulsen
- Jarðhita
- Felagið føroyskir grannskoðarar
- Jarðfeingi
- Kommunufelagnum
- Betri Banka
- BankNordik
- Norðoyar Sparikassa
- Suðuroyar Sparikassa

Uppskotið hevur somuleiðis ligið alment frammi á hoyringarportalinum hjá Fíggjarmálaráðnum.

## Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

### 2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Lógaruppskotið hevur fíggjarligar avleiðingar fyri landið.

Sambært uppgerð frá TAKS eru til og við oktober 2023 endurrindaðar 23,6 mió. kr. fyri grønar hitaskipanir. Til samanberingar var upphæddin 8,8 mió. kr. sama tíðarskeið í fjør og 2,4 mió. kr. í alt í 2021.

Meirvirðisgjaldsfrítøkan fyri talgildar tíðindamiðlar verður mett at kosta landskassanum 0,5 mió. kr.

### 2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Lógaruppskotið hevur umsitingarligar avleiðingar fyri TAKS.

Ein leinging av skipanini við afturbering av meirvirðisgjaldi hevur neiligar fyrisitingarligar avleiðingar fyri TAKS. Hinvegin gera talgildar fráboðanir av støddini á útgangandi og inngangandi avgjaldinum í tíðarskeiðnum og støddini av søluni, sbrt. § 12, stk. 1-4, ið ikki skal roknast við í avgjaldsskyldugu søluna, umsitingina hjá TAKS einfaldari og meira tíðarhóskandi. Tað sama ger seg galdandi fyri javnsetanina av tíðindabløðum og talgildum tíðindamiðlum í meirvirðisgjaldshøpi.

### 2.3. Avleiðingar fyri vinnuna

Lógaruppskotið hevur jaligar avleiðingar fyri vinnuna.

Fíggjarmálaráðið hevur fingið upplýst frá umboðum fyri vinnuna, at veitingartíðin til eina jarðhitaskipan er 10 mánaðir. Veitingartíðin til eina luft til vatnskipan er styttri, tí har eru fleiri veitarar á marknaðinum.

### 2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið

Lógaruppskotið hevur jaligar umhvørvisligar avleiðingar.

### 2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum

Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

### 2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir

Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.

### 2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum

Føroyar hava bundið seg til at fylgja París avtaluni um at minka útlátið av veðurlagsgassi. Við at leggja upphiting um til elgrundaða upphiting heldur enn oljugrundaða upphiting minkar útlátið av $CO_2$.

## 2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar

1) **Hoyvíkssáttmálin**
   Lógaruppskotið hevur ongar avleiðingar fyri Hoyvíkssáttmálan.

2) **Evropeiski mannarættindasáttmálin, EMRS**
   Lógaruppskotið hevur ongar avleiðingar fyri Evropeiska mannarættindasáttmálan.

3) **Sáttmáli Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek**
   Lógaruppskotið hevur ongar avleiðingar fyri Sáttmála Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek.

## 2.9. Markaforðingar

Lógaruppskotið hevur ikki við sær markaforðingar.

## 2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv

Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um revsing, fyrisitingarligar sektir ella pantiheimildir, og lógaruppskotið ger heldur ikki onnur størri inntriv í rættindi hjá fólki.

## 2.11. Skattir og avgjøld

Talan er um eitt skattauppskot.

## 2.12. Gjøld

Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um gjøld.

## 2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?

Fyri at gera umsitingina av avgjaldsuppgerðini einfaldari og meira tíðarhóskandi verður ásett, at skrásett virkir skulu talgilt boða TAKS frá støddini á útgangandi og inngangandi avgjaldinum í tíðarskeiðnum og støddina av søluni, sbrt. § 12, stk. 1-4, ið ikki skal roknast við í avgjaldsskyldugu søluna.

## 2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?

Lógaruppskotið leggur ongar heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunurnar.

## 2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?

Lógaruppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn uttan rættarúrskurð.

## 2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?

Lógaruppskotið stuðlar undir átak 7 um burðardygga orku og veðurlagsátak 13 í Heimsmálunum hjá ST.

## 2.17. Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

| | Fyri landið ella landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss ella øki í landinum | Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Nei | Ja |
| Umsitingarligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Nei | Ja |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Ja | Ja | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Ja | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | Nei | Nei | |

## Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

### 3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

**Til § 1**
**Nr. 1**
Við ásetingini verður stigvísa minkingin av afturberingin av meirvirðisgjaldi fyri grønar hitaskipanir longd og broytt nakað, tí at mett verður, at tað er ov ógvisligt at minka stigvísu afturberingina eftir verandi leisti.

Ásetingin ber í sær, at alt meirvirðisgjaldið við keyp av grønum hitaskipanum verður afturborið í 2024. Árini 2025, 2026 og 2027 minkar afturberingin við 25 prosentstigum um árið fyri síðani at steðga heilt í 2028.

**Nr. 2**
Sambært § 12, stk. 1, litra h í meirvirðisgjaldslógini er søla av tíðindindabløðum meirvirðisgjaldfrí. Søla av talgildum avísum er hinvegin ikki meirvirðisgjaldsfrí, og verður kappingin millum tíðindabløð og talgildu tíðindamiðlarnar tí ójøvn.

Verandi skipan er harnæst ein avbjóðing fyri TAKS, tá talan er um miðlar, sum lutvíst eru talgildir, lutvíst analogir, tí tað ber til at tekna hald, sum antin fevnir um annað ella bæði.

Í Danmark hava talgildir tíðindamiðlar verið javnsettir við tíðindabløð seinastu gott og væl fýra árini. Broytingin í donsku momslógini varð gjørd eftir at ES Ráðið við direktivi nr. 2018/1713/EU frá 6. november 2018 broytti direktiv 2006/112/EF, sum higartil ikki hevði loyvt, at talgildir miðlar vórðu viðgjørdir eins og at tíðindabløð í meirvirðisgjaldshøpi.

Føroyska meirvirðisgjaldslógin byggir á áðurnevnda ES-momsdirektiv.

Við ásetingini verða tíðindabløð og talgildar tíðindamiðlar javnsettir í meirvirðisgjaldshøpi.

**Nr. 3**
Galdandi lóggáva ásetir ikki, hvussu skrásett virkir skulu boða TAKS frá støddini á útgangandi og inngangandi avgjaldinum í tíðarskeiðnum og støddini av søluni, sbrt. § 12, stk. 1-4 í meirvirðisgjaldslógini, ið ikki skal roknast við í avgjaldsskyldugu søluna.

Fyri at gera umsitingina av avgjaldsuppgerðini einfaldari og meira tíðarhóskandi verður nágreinað, at skrásett virkir talgilt skulu boða TAKS frá støddini á útgangandi og inngangandi avgjaldinum í tíðarskeiðnum og støddina av søluni, sbrt. § 12, stk. 1-4, ið ikki skal roknast við í avgjaldsskyldugu søluna.

**Til § 2**
Áseting um gildiskomu.

Løgtingslógin kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

§ 1, stk. 1 hevur virknað frá 1. januar 2024, og ber hetta í sær, at alt meirvirðisgjaldið við keyp av grønum hitaskipanum verður afturborið í 2024. Árini 2025, 2026 og 2027 minkar afturberingin við 25 prosentstigum um árið fyri síðani at steðga heilt í 2028.

§ 1, nr. 2 og 3 hava virknað frá 1. ársfjórðingi 2024. Broytingin ber í sær, at søla av talgildum avísum er meirivirðisgjaldsfrí frá 1. januar 2024 at rokna. Víðari ber broytingin á sær, at skrásett virkir skulu boða TAKS talgilt frá støddini á útgangandi og inngangandi avgjaldinum í tíðarskeiðnum og støddini av søluni,  sbrt. § 12, stk. 1-4, ið ikki skal roknast við í avgjaldsskyldugu søluna. Freistin at lata TAKS avgjaldsuppgerðina fyri fyrsta ársfjórðing er 10. mai 2024.

Fíggjarmálaráðið, 8. november 2023

**Ruth Vang**
landsstýriskvinna

/ Bjarni Askham Bjarnason

**Yvirlit yvir fylgiskjøl:**
Fylgiskjal 1: Javntekstur